# Uttangarðsútskifting
# í
# Funningi




## *Líðin*

***Fremragonga***

matr.nr.

62-190a

**Hósdagin 26. okt. 2017 kl. 19.00 varð útskiftingarfundur settur í skúlanum í Funningi at viðgera mál um býti av haganum *Líðini - Fremragonga*, matr. nr. 190a, Funningur.**

Møtt: Umleið 20 eigarar og áhugaði møttu á fundi.

Nevndin var fullmannað, og er hon skipað soleiðis:

**Petur Nielsen**, formaður
**Heini á Heygum**, nevndarlimur
**Malan Vilhelm**, nevndarlimur

Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara, at tað nemur teirra gegni.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal og Óli Johansen.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Skjal um ógegni nevndarlimanna.

Skjal nr. 2: Lýsingar, ið hava staðið í Sosialinum 6. og 11. okt. og í Dimmalætting 6. okt. 2017, í kunngerðatalvuni í Funningi og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og Runavíkar kommunu.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingina ella lýsingarháttin, svaraði eingin.

Skjal nr. 3: Grannastevnuviðtøkan frá 9. apríl 2015 við tilhoyrandi skjølum og staðfest av Búnaðarstovuni 10. sept. 2015.

Skjal nr. 4: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 15. sept. 2015, har Petur Nielsen er uppnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 5: Útskrift úr rættarbókini, 16. febr. 2016, har Heini á Heygum, Vestmanna, og Malan Vilhelm, Kunoy, verða uppnevnd til nevndarlimir.

Formaðurin lýsti síðani fundin lógliga lýstan og settan.

Víst varð til § 10 í útskiftingarlógini um, at útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja tað.

Formaðurin greiddi síðani frá mannagongdini í sambandi við útskiftingina og bað fundarfólkið greiða frá haganum og skipanini av honum.

*Líðin*, *Fremragonga*, matr. nr. 190a, er 2 mk. 12 gl. stórur og o.u. 287 ha. til víddar. Hetta er alt ogn. Skipanin er nú 154 áseyð, og alt er í kenning. Tað eru tvær gongur í haganum, og seyðurin er hampiliga støðufastur. Stik klívur hagan av rættini niðan undir vegin til Gjáar.

Hagabýtini hava verið fleiri í Funningi, tað seinasta í 1995, tá Líðin fór sundur í Fremrugongu og Ytrugongu.

Fremragonga er ringur vetrarhagi, og atgongdin til vetrarbit á bønum er avmarkað.

Hagastýrisformaður, Sigmar Bláberg, greiddi frá, at úrtøkan úr haganum hevur verið lítil í fleiri ár, men seinastu 2-3 árini er vorðið nógv frægari, nú seyður teirra er havdur inni síðst á vetrinum.

Tað er upp á tal at gera seyðhús, men semja er ikki um hetta, tí summi vilja halda, at kostnaðurin er ov høgur, og at hetta á ongan hátt er búskaparliga ráðiligt.

Flestu eigararnir tykjast tó vera á einum máli um, at átrokandi er, at skipaninin av haganum verður bøtt, og á grannstevnuni var tí eisini trivaligur partur av eigarunum fyri at krevja útskifting.

Á fundinum var tó ikki semja um, um rætt er at kloyva hagan í tvinnar partar.

Formaðurin endaði fundin, tá klokkan var farin av nýggju, og bað fundarfólkið kunna seg á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni um, hvussu leikur víðari fer í málinum.

Nevndin viðgjørdi málið eftir fundin.

Á grannastevnuni tóku flestu eigararnir undir við kravinum um útskifting, men á fundinum í kvøld vóru ikki øll fyri at býta. Tað tykist sum eigararnir eru í tveimum áleið einsstórum bólkum.

Ósemja er um raksturin av haganum, og hetta forðar eyðsýniliga fyri skinsamari røkt.

Lítið er at ivast í, at hagin sum hagi ikki verður betur av at verða kloyvdur, men fundarfólkið helt, at tað ber til at býta hagan í tveir væl nýtiligar og javngóðar partar. Tá verða færri í hvørjum parti, og røktin kanska léttari.

Sum grundsjónarmið dámar útskiftingarnevndini lítið, at hagapartarnir verða ov smáir, tí ofta er støddin í sær sjálvum ein trupulleiki fyri skinsomun rakstri. Ein hagi er ein felagsskapur, og ein felagsskapur skal stýrast, og hetta eiga eigararnir at finna út av. Í hesum føri, tykist hetta tó ikki at bera til.

Nevndin avgjørdi tí at býta.

Mælt verður eigararunum til at seta fram ynski um, hvussu hagin kann býtast, og at lata nevndini hesi fyri 1. des. 2017.

Skjøl vm. síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni: http://us.fo/Utskifting

*Petur Nielsen* *Heini á Heygum* *Malan Vilhelm*

**Nevndin hittist á fundi á Umhvørvisstovuni á Argjum 22. nov. 2018 at viðgera býti av haganum Líðin, Fremragonga.**

Nevndin var fullmannað: Heini á Heygum, Malan Vilhelm og Petur Nielsen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen, Rebekka á Rógvi Johnsdóttir og Arnold Thomassen.

Rebekka læs gerðabókina upp.

Nevndin hevur móttikið tvey ynski. Ynskini vórðu lisin upp, og nevndin hevur tikið tey við í viðgerðini.

Skotið verður upp at klúgva hagan í tvey. Sí skjal nr. 6. Skjal nr. 6 - Fyribilsuppskot

Markið millum hagarnar verður úr markinum móti Eiði, merkt 802 á máliblaðnum, eftir røðini á punkt, merkt 598, eftir Katlunum og í núverðandi frágarð til uml. 10 m niðan frá bøgarðinum, hagani fer markið mitt í bøgarðin, har hagastykkið er.

Vetrarbitið verður býtt soleiðis, at sunnari hagin fær vetrarbit niðanfyri vegirnar litra b og d og oman í Stórá, meðan norðari hagin fær vetrarbit omanfyri vegirnar litra b og d, sí skjal nr. 7.

Eitt ynski er komið til haganavn: Dyllan. Tey, ið standa aftan fyri hetta ynski, hava ynskt at liggja sunnari. Sunnaripartur fær sostatt navnið Dyllan, meðan norðari partur heldur gamla navnið Líðin, Fremragonga.




Eftir uppskotinum, skjal nr. 6, verður markatalið hjá Dylluni 1 mk 05 gl, áseyðatalið verður 74, sum er 3,5 á gyllin. Uttangarðsvíddin verður áleið 120 ha, og vetrarbitið áleið 1,5 ha. Markartalið hjá Líðini, Fremragonga verður 1 mk 07 gl, áseyðatalið verður 80, eisini her eru 3,5 á gyllin. Uttangarðsvíddin verður áleið 156 ha, og vetrarbitið verður áleið 1,4 ha.

Á Dalsbøi eigur Líðin, Fremragonga tveir lutir. Norðari luturin ,har rættin stendur, fellur til Liðina, Fremrugongu, og sunnari luturin fellur til Dylluna.

Rættin fellur til Líðina, Fremrugongu, men Dyllan skal hava tinglýstan brúksrætt til rættina tey fyrstu 5 árini eftir, at útskiftingin er framd.

Tiltøk í haganum, ból, stik o. a. falla til hagapartin, tey eru í.

Garðsskyldan verður býtt millum hagarnar, soleiðis at Líðin Fremragonga, hevur frá hagamarkinum móti Líðini, Ytragonga, til 10 m vestanfyri garðshornið á matr.nr. 153. Dyllan hevur garðsskylduna hagani frá og 22 m niðan á matr.nr. 4. Sí skjal nr. 7.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum millum hagapartarnar.

Hagin eru skipaðir í kenning, so sigast kann, at seyðurin er býttur. Fyri at fáa hagfastan áseyð verður rátt eigarum, at býta um áseyð ella sleppingarlomb í klipping 2019, tá býtið kemur í gildi.

Útskiftingin kemur í gildi í klippingini 2019.

*Petur Nielsen* *Heini á Heygum* *Malan Vilhelm*

**Mánadagin 10. desember 2018 kl. 1300 var útskiftingarfundur settur í skúlanum í Funningi. Framløga av fyribilsplani var á dagsskránni.**

Nevndin var fullmannað: Heini á Heygum, Malan Vilhelm og Petur Nielsen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møttu: Jógvan Frýdal, Óli Johansen, Rebekka á Rógvi Johnsdóttir og Arnold Thomassen.

Møttir vóru 12 eigarar.



Við karamellublikkinum í hondini bað formaðurin fundarfólkinum vælkomnum.

Meðan fundarfólki tugdi, legði formaðurin fram Skjal nr. 5 - Lýsingina, og lýsti fundin lógliga settan, og gerðabókin lisin upp. Skjal nr. 6 - Fyribilsplanurin og Skjal nr. 7 – Vetrarbit og garðsskylda vórðu løgd fram.

Á Dalsbøi eigur Líðin, Fremragonga tveir lutir. Norðari luturin, fellur til Liðina, Fremrugongu, og sunnari luturin fellur til Dylluna.



Rættin, sum stendur á norðara lutinum fellur til Líðina, men Dyllan skal hava tinglýstan brúksrætt til rættina tey fyrstu fimm árini eftir at útskiftingin er framd.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum.

Útskiftingin kemur í gildi í klipping 2019

Av tí at hagin er skipaður í kenning, kann sigast, at seyðurin er býttur. Fyri at fáa hagfastan seyð, verður rátt til at býta um áseyð ella sleppingarlomb í klipping 2019, tá býtið væntandi kemur í gildi.

Tað vóru ikki stórvegis viðmerkingar til uppskotið. Øðrvísi var tá skjal nr. 8 - Eigaralisti eftir fyribilsplaninum, varð lagdur fram. Her vísti tað seg tíverri, at bland var komið í, og at nakrir eigarar ikki vóru við á listanum. Fundarfólkið varð kunnað um, at hetta verður rættað, áðrenn eigaralistin verður lagdur fram alment fram.

Greitt var eisini frá, at gerðabókin, skjal nr. 6 - Fyribilsplanur, skjal nr. 7 - Vetrarbit og garðsskylda og skjal nr. 8 - Eigaralistin eftir fyribils-planinum verða løgd á heimasíðuna hjá Umhvørvisstovuni.



Viðmerkingar til planin kunnu sendast nevndini á teldupostadressuni us@us.fo í seinasta lagi **10. januar 2018**. Viðmerkjast skal "Útskifting av Líðini, Fremragonga".

Tá freistin er farin, samlast nevndin at viðgera viðmerkingarnar og taka støðu til endaliga útskiftingarplanin, sum síðani verður kunngjørdur og lagdur fram alment.

Útskiftingin verður nú latin til ákæru, og hesuferð skal kærast til Yvir-útskiftingarnevndina. Kærufreistin er 3 mánaðar.

Formaðurin takkaði fyri góðan fundarsið, og fundurin varð slitin fyri kl. 14.

*Petur Nielsen* *Heini á Heygum* *Malan Vilhelm*



**Í besta lembingarveðri 15. mai, savnaðist nevndin at viðgera tær innkomnu viðmerkingarnar til fyribilsplanin.**

Nevndin var fullmannað: Heini á Heygum, Malan Vilhelm og Petur Nielsen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møttu: Jógvan Frýdal, Óli Johansen og Arnold Thomassen.

Fyrst lá leiðin niðan á Gjáarskarð, har støðgað varð á fyri enn einaferð at meta um fløtuna uppi á Brekku.

Nevndin heldur fast við metingina, at fløtan er vánaligur hagi til seyð. Næsti støðgur var við rættina á Dalsbø. Rættin ber brá av, at har mugu gerast ábøtur í næstum, og við tí grund-geving metir nevndin, at 5 ára brúks-rættur er í meira lagi. Nú lá leiðin oman í skúlan at fundast. Gerðabók og innkomnu uppskotini vórðu lisin upp.

Uppskot til endligan útskiftingarplan varð lagt fyri nevndina, sum var samd um at leggja hendan - við smávegis rættingum - fram sum endaligan úrskurð á útskiftingarfundinum seinni á degi.

Fundurin varð slitin kl. 1330.





**Mikudagin 15. mai 2019 hevði útskiftingarnevndin fund í skúlanum í Funningi at viðgera uppskot til endaligan útskiftingarplan.**

Nevndin var fullmannað. Heini á Heygum, Malan Vilhelm og Petur Nielsen fm.



Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen og Arnold Thomassen.

Formaðurin bað teimum átta frammøttu fundarfólkinum vælkomnum. Síðan spurdi hann fundarfólki um lýsing og lýsingarhátt. Ongin mótmælti og so lýsti formaðurin fundin lógliga lýstan og settan.

Gerðabókin frá síðsta fundi varð lisin.

Nevndin hevði móttikið tríggjar viðmerkingar, og nevndin hevur tikið tær við í viðgerini.

Eigarin av matr. nr. 141 hevur sent inn ynski um at vera lagdur í nýggja hagapartin Dylluna. Umboð fyri Dylluna hava eisini verið á gátt og ynskt at fáa matr. nr. 141 suður um markið. Samstundis upplýstu teir, at alt matr. nr. 58 skal liggja í Dylluni.

Umboð fyri Líðina, Fremragonga, eru somuleiðis komin við viðmerkingum til býtið. Fyrsta ynski er navnabroyting til Slættaratindur. Eisini verður ført fram, at 5 ára nýtslurættur til rættina er alt ov long tíðarskeið, og at vetrarbitið eigur at verða broytt, so tað gongur í Stórá.

Eftir at fyribilsplanurin varð lagdur fram, hevur staðkent fólk borið upp á mál, at Líðin, Fremragonga, hevur verið fyri vannbýti. Serliga tí á fløtuni uppi á Brekku er nógv reytt gras, sum onki nyttar til seyð.



Verður hugt eftir skjali nr. 6 – Fyribilsplanur, er býtt soleiðis:

- **Dyllan**, 1 mk 5 gl, og áseyðatalið er 74. Víddin er 120 ha, og av hesum eru 17 ha niðanfyri 200 m. Vetrarbitið er 1,5 ha.
- **Líðin**, **Fremragonga**, 1 mk 7 gl, og áseyðatalið 80. Víddin er 156 ha, og av hesum eru 10 ha niðanfyri 200 m. Vetrarbitið er 1,4 ha.

Úr rættini niðan undir vegin er góður frágarður. Hildið varð, at hesin er eitt nátúrligt mark millum partarnar. Hetta gjørdi so, at tann tá minni parturin fekk størri og betri vetrarhaga. Hagin er suðurvendur, og hetta økir eisini um dygdina. Norðari parturin var størri í vídd, men, sum upplýst varð, er dygdin heldur lakari. Serliga er stórt øki á Brekku, sum er vánaligt til seyð.

Tað verður mett, at um 2½ gyllin, 10 áseyðir, verða fluttir suður um, uttan at markið verður broytt, so ger hetta, at tann ójavnin, sum var í fyrsta uppskotinum, nú verður minni.

Nevndin ásetur tí at:

- Matr. nr. 58 verður lagt í Dylluna
- 13 1/3 skinn av matr.nr. 3 verða flutt til Slættaratind.
- Matr. nr. 141 verður flutt í Dylluna, og at 6 skinn vera eftir í norðara hagapartinum (Líðin, Fremragonga), sum nú verður nevndur Slættaratindur.
- 5 skinn av matr.nr. 98 verða flutt í Slættaratind
- Matr.nr. 14, 112a og 137 verður flutt úr Dylluni í Slættaratind
- Tinglýsti brúksrætturin verður settur til 1 ár.
- Vetrarbitið verður óbroytt.

Lagt verður fram:

- Skjal nr. 9 - Endaligur útskiftingarplanur
- Skjal nr. 10 - Vetrarbit og Garðsskylda
- Skjal nr. 11 - Eigaralisti

**Úrskurður:**

Líðin, Fremragonga, matr. nr. 190a í Funningi, verður býttur í tveir partar

**matr. nr. 190a - Slættaratindur 01-05-00**
**matr. nr. 190d - Dyllan 01-07-00**

sí eigaralistan skjal nr. 11.

Markið millum hagarnar verður eftir býti sum skjal nr. 9 vísir.




Vetrarbit og garðsskylda verða býtt sum skjal nr. 10 vísir.




Á Dalsbø eigur Líðin, Fremragonga, tveir lutir. Norðari luturin, fellur til Slættaratind, og sunnari luturin fellur til Dylluna.

Rættin, sum stendur á norðara lutinum fellur til Slættaratind. Dyllan skal hava tinglýstan brúksrætt til rættina tað fyrsta árið, eftir at útskiftingin er framd.

Av tí at hagin er skipaður í kenning, kann sigast at seyðurin er býttur. Fyri at fáa hagfastan seyð verður rátt til at býta um áseyð ella sleppingarlomb í klipping 2019, tá býtið væntandi kemur í gildi.

Hús og tiltøk, ból, stik o.a. falla til hagapartin, tey eru í, og hagarnir hava øll rættindi inni á sær sjálvum. Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum.

Álagt verður Umhvørvisstovuni at seta markið millum nýggju hagarnar skjótast til ber.

Umhvørvisstovan ger upp útskiftingarroknskapin, og verður eigaranna partur av kostnaðinum álíknaður nýggju høgunum eftir markatalinum.

Útskiftingin kemur í gildi í klipping 2019

Úrskurðurin verður latin til ákæru.

Kærur skulu vera skrivligar, stílast til Yvirútskiftingarnevndina og sendast Sorinskrivaranin, Postboks 28, 110 Tórshavn.

Tær skulu vera honum í hendi í seinasta lagi 20. august 2019.

Útskiftingin er endað.

*Petur Nielsen* *Heini á Heygum* *Malan Vilhelm*